

FRÓÐI IKKI TIL B36

Seinastu vikurnar hevur ein søga um at liðskiparin hjá HB, 36 ára gamli Fróði Benjaminsen, er á veg til grannarnar úr B36 fingið bein at ganga á. Norðlýsið hevur sett spurningin og portalurin hevur borðið søguna víðari, men landsliðsliðskiparin kennir einki til søgurnar

Tróndur Arge

– Eg kenni einki til hasar søgurnar og tað er ikki aktuelt at skifta til B36. Vit hava ikki verið í samráðinum, so tey sum siga tað vita meiri enn eg, sigur Fróði Benjaminsen eitt sindur bilsin á málinum.

Fróði Benjaminsen hevur fyrr verið settur í samband við B36, sum hann umboðaði frá 2005 til 2007.

- Eg havi ikki tikið støðu til komandi kappingarár enn, men um eg haldi fram, so verður tað allarhelst í HB, sigur Fróði Benjaminsen við in.fo, tíðindaportalin hjá Miðlahúsinum.

Eisini formaðurin í HB, Finnbogi Arge, er bilsin um søguna. Í HB ynskja tey, at Fróði Benjaminsen heldur fram í felagnum.

- Vit ynskja og vóna, at Fróði heldur fram í HB, sigur Finnbogi Arge í stuttari viðmerking og vísir á, at HB ikki hevur sett seg niður at gera sáttmálar fyri komandi kappingarár.

Sostatt tykist greitt, at Fróði Benjaminsen ikki skiftir til. Spurningurin er heldur um Fróði heldur fram at spæla í HB, sum hann hevur umboðað síðani 2008.

trondur@sosialurin.fo





RÓKUR AVLOYSIR JON

Eftir at hava røkt formanssessin í Svimjisambandinum í tilsaman fjúrtan ár hevur Jon Hestoy nú lagt frá sær. Hann bað farvæl á aðalfundinum í Svimjisambandi Føroya, sum varð hildin í dag.

Nýggjur formaður er Rókur í Jákupsstovu. Talan er um nátúrligt ættarliðsskiti, tí Rókur hevur verið næstformaður seinastu fimm árini. Í hesum tørninum hevur Jon Hestoy verið formaður í seks ár.

Eyðun Húsgarð, sum var eykalimur, loysir Rók í Jákupsstovu av sum næstformaður.

Umframt Jon Hestoy fór eisini Hanna í Horni úr nevndini. Nýggj í nevndini er – umframt Eyðun Húsgarð – Katrin Sørensen.

joannes@sosialurin.fo



Heimasíðurnar skriva:

www.b36.fo:
Long John Silver verður verðandi hjá grannunum fyri norðan. The Golden Boys spæla í hvítum, og tað varð staðfest í dag.

www.hb.fo:
Havnar Bóltfelag hevur nú sett nýggja høvðusvenjaran hjá kvinnumum. Tvey ára sáttmáli er gjørdur við Lennard Pedersen, sum seinastu árini hevur verið venjari hjá AB.

www.nordlysid.fo:
Niðurstøðan má vera, at tað var KÍ sum gjørdi, at HB ikki vann FM í 2014.

www.nsi.fo: U14
Á leikvøllinum vunnu NSÍ og HB sær 59 stig í part fyri 22 dystir. NSÍ var betra liðið innanhýsis, og tískil kundi hetta verið nokk til at vinna FM-steypið. Men HB vann sær 2 stig afturat á skrivaraborðinum, og tískil endaði gullið í Havn. Til lukku við tí.

www.vikingur.fo:
Eins og fleiri ferðir fyrr royndust skálamenn okkum boysnir. Hóast úrslitið ikki gjørdist tað, vit frammanundan væntaðu, eiga okkara menn tó rós fyri at reisa seg aftur og megna javnleik eftir ein tílikan vátan vøtt.

www.in.fo:
Sonni Ragnar Nattestad var somuleiðis á vøllinum allar 90 minuttirnar, tá AC Horsens í dag vann heimadystin móti AB 3-1.

Ítróttar KLUMMAN

Tróndur Arge

Heimsmet, hondbóltssøga og »La Decima«

Hetta vikuskiftið bjóðaði upp á fleiri spennandi søgur úr føroyska ítróttarheiminum. Kvinnurnar hjá KÍ settu heimsmet við at vinna meistaraheitið fyri 15. ferð upp í slag. Kvinnurnar hjá Kyndli skrivaðu hondbóltssøgu, tá tær vunnu seinna dystin móti belgiska Femina Vise í Europa Cup. Umframt tað, so staðfesti B36 eisini FM heitið í gjár, tá teir vunnu tíggjunda meistarheitið fyri árstalsfelagið.

Heimsmet í Klaksvík

Rás2 var á staðnum, tá KÍ leygardagin bleiv fagnað, tá endaliga staðfestingin av heimsmetinum gjørdist veruleiki. Sum vanligt, so vann KÍ dystin og Rannvá B. Andreasen skoraði. Stóra løtan var aftaná dystin, tá spælararnir blivu fagnaðir av stórari áskoðarafjøld.

Nógv var gjørt burturúr og Aria var aftur á palli saman til stórhendingina. At vinna 15 ferðir upp í slag er eitt satt bragd. At halda áfram at vinna ár eftir ár krevur ein sterkan vilja. KÍ kvinnurnar hava við hesum sett heimsmet, men spurningurin er hvussu hini feløgini hava tað við, at tey ikki hava megnað at steðga KÍ eina tí einastu ferð.

Eina árið vann KÍ meistarheitið við tveimum málum í evstu løtu móti B36. Tá kom meistaraheitið til høldar upp á málúrtøku. Ein ferð helt ein KÍ viðhaldsmaður skemtiliga fyri, at tað næsta royndin at steðga KÍ verður felagsliðið EB/Streymur/Skála/ÍF/Víkingur/HB/AB/B36.

KÍ kvinnurnar hava sett KÍ á heimskortið fyri góða – og føroyskan kvinnufótbólt fyri tað heldur minni góða.

Hondbóltssøga á hálsi

Sunnudagin vann Kyndil við einum máli móti Femina Vise úr Belgia í Europa Cup. Tíverri var talan um samlaðan ósigur, tí gestirnir úr Belgia vunnu fyrra dystin við sjey málum. Tí var talan í størri mun um ein moralskan sigur heldur enn ein kappingarføran sigur.

Kvinnurnar hjá Kyndli eru ungar og føroyskur hondbóltur hevur lítlar og ongar altjóða royndir. Tað sást í fyrsta dystinum, men sum við øllum øðrum, so má ein byrjan verða onkustaðni. Kyndil hevur nú fingið nakrar týdningarmiklar royndir, sum vónandi geva teimum mót upp á meir. Føroyskur hondbóltur tykist verða í ein menning, so tað er týdningarmikið at avbjóðingarnar fylgja við.

B36 fær stjørnuna

B36 tryggjaði sær í gjár tíggjunda meistaraheitið, sum gevur teimum eina stjørnu á búðmerkið. Tað er ein staðfesting av, at B36 nú hevur vunnið meistaraheitið so oftani, at tað skal frámerkjast.

B36 hevur síðani 1997 verið meistari fimm ferðir. Undan meistaraheitinum í 1997 hevði felagið ikki vunnið FM síðani 1962. Onkuntíð var nær við, men teir vóru nærmast tiltiknir fyri at kiksa, tá tað á stóð.

Tað er ikki longur tilfeldið og B36 hevur enn eina ferð víst, at teir nú eru millum teir størstu í føroyskum fótbólti.

Besta sms'ið í Triða Hálvleiki hjá Rás2:

B36 B36 B36 eru FØROYAMEISTARIR

(B68 - B36)

